ATLANTIC AIRWAYS
HONDBÓLTUR KVINNUR

# StÍF satsar uppá egið fólk

**StÍF hevur síðstu árini víst ungu leikarunum í felagnum álit. Venjarin heldur, at gongdin hevur verið góð, so nú vilja tey av Strondum og Skála enda millum fýra tey ovastu.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*“Vit hava satsa uppá egið fólk, og hetta hevur verið rætta gongdin. Nú er málið at enda í ovara bólki í endaspælinum og spæla um medaljur.” Hetta sigur Jústines Justinusen.*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Síðstu árini hevur kvinnuliðið hjá StÍF satsa uppá egið fólk. Teir hava ikki keypt útlendingar til felagið, men hava í staðin valt at givið fleiri av ungu leikarunum hjá felagnum møguleikan. Nú hava hesir ungu leikarar savnað sær størri royndir í bestu deildini, so vónirnar eru at røkka millum fýra tey ovastu.

### Hava valt at satsa uppá egið fólk

Jústines Justinusen, sum er venjari hjá besta kvinnuliði hjá StÍF, sigur, at teir hava valt at geva ungu leikarunum møguleikan. “Vit hava hildið tað verið best, at geva okkara ungu leikarum møguleikan. Okkara ungdómsarbeiði hevur altíð verið gott, so vit halda tað vera skeivt, um ungu leikararnir ikki sleppa til.”

Í fjør var liðið hjá strandakvinnum bert mannað av føroyskum leikarum fyriuttan málverjan, sum er úr Rumenia. Jústines heldur, at gongdin hjá liðnum í fjør var góð, tí tær kláraðu at vinna niðara bólkin. Nú sigur hann seg vóna, at leikararnir eru klárir at taka næsta stigið á vegnum, sum er at enda kappingina í ovara bólki.

### Ungu leikararnir hava góða framtíð

Jústines sigur víðari, at ungu leikararnir hjá StÍF hava eina stak góða framtíð, og vónar, at teir kunnu halda fram við teirri menning, sum teir hava víst tey síðstu árini. “Ja, vit hava nógvar góðar ungar leikarar, ikki bert á besta liðnum, men eisini í yngru deildunum. Um vit halda fast um okkara koncept, og halda á fram við at geva ungu leikarunum møguleikan, so trúgvi eg, at hetta StÍF liðið um nøkur ár kann vera við til at mynda oddin á føroyskum kvinnuhondbólti.”

StÍF hevur nógvar spennandi ungar leikarar, sum Jústines sigur. Av hesum kunnu nevnast Malan Petersen, sum hevur spælt vinstri vongur, Ninna K. Johansen, sum hevur spælt á hinum vonginum, og eisini høgri bakkurin, Rebekka Justinusen, sum var ein av teimum føroysku leikarunum, sum fekk flest mál síðsta kappingarár.

“Umframt hesar leikararnar, so hevur StÍF fleiri uppaftur yngri leikarar, sum innan fá ár fara at gera seg galdandi í bestu deildini,” sigur Jústines.

### Kyndil er størsti kappingarneytin

Jústines sigur, at um tær skulu gera sær vónir um at enda í ovara bólki í endaspælinum, so mugu tær fyrst og fremst vinna dystirnar ímóti teimum veikaru liðunum. “Dystirnir móti Stjørnuni, Neistanum og VB vera ringir, men eg vóni, at vit kunnu fáa okkurt stigi ímóti hesum liðunum. Hinvegin er tað sera týdningarmikið fyri okkum, at vit vinna dystirnar móti Kyndli og Søljuni. Gera vit tað, so er stórur møguleiki fyri, at vit kunnu enda í ovara bólki, tá endaspælið fer í gongd.”

Tað er kanska ikki ógjørligt, tí við stóru menningini á ungu StÍF liðnum í huga, so er ikki óhugsandi, at tær kunnu spæla upp ímóti teimum bestu.

### StÍF á rættari kós

Nú liggur eitt nýtt kappingarár fyri framman, og StÍF er eitt av teimum liðunum, sum kann fara at taka øll á bóli í ár. Vit spurdu tískil Jústines, um hann helt tað vera realistiskt, at eitt so ungt lið, sum tað hjá strandakvinnum, hevur møguleika at enda millum fýra tey ovastu. “Eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki skulu tað. Ja, vit hava nógvar ungar leikarar, men teir eru sera góðir, og eg ivist onga løtu í, at hetta er rætta gongdin hjá okkum. Eg vóni at hetta verður árið, har vit fara at gera ein vørr.”

Vit kunnu ikki vita, um hetta verður árið hjá StÍF, men eitt er sikkurt. StÍF hevur fatur á rætta endanum, tí ungu føroysku leikararnir mugu og skulu fáa møguleikan, so nú verður spennandi at síggja, um ungu strandakvinnurnar megna at taka føroyska hondbóltsheimin á bóli.

## FAKTA – StÍF kvinnur

**Stovnað:**..................... 1942
**Formaður:**................. Andras Danielsen
**Venjari:**....................... Jústines Justinusen
**FM-heiti:**..................... Einki sum StÍF, 2 sum Skála

# – Vit skulu bara trúgva upp á tað

**Rebekka Justinusen og Ninna K. Johansen eru bert tveir av evnaríku leikarunum hjá StÍF. Tær halda báðar, at nú skal besta kvinnulið hjá strandingum upp í ovara bólk at spæla.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Rebekka Justinussen og Ninna K. Johansen umboða høgru síðu á kvinnuliðnum hjá StÍF. Tær eru báðar ungar og lámar, og eru tær partar av góða ungdómsarbeiðnum hjá StÍF. Vit fingu okkum eitt prát við tær um komandi kappingarár.

### Eitt lið í framgongd

Vit spurdu tær báðar um møguleikarnar hjá StÍF í ár. “Vit eru eitt lið í framgongd. Vit hava nógvar evnaríkar leikarar, og tað tekur tíð at venja ungar leikarar við 1. deild,” sigur Ninna. Rebekka tekur undir við henni og leggur afturat, at sjálvt um tær eru eitt lið í framgongd, so vilja tær enda millum fýra tey ovasta í ár. “Vit hava fingið størri royndir nú, og liðið er nóg gott til at vinna á fleiri av hinum liðunum.”

### Trúgvin hevur størsta týdningin

Tær halda báðar, at tað hevur verið rætt av felagnum at geva ungu leikarunum møguleikan, tí at hetta fer at geva úrslit í framtíðini. “Um eini tvey ella trý ár fer hetta liðið at vera eitt tað sterkasta í landinum,” sigur Rebekka.

Ninna ásannar tó, at tað krevur eitt sindur av leikarunum sjálvum fyri at fáa góð úrslit, og hon sigur, at tað týdningarmesta er trúgvin upp á ein sjálvan. “Tað er altíð trupult hjá ungum leikarum, men tað týdningarmesta er at trúgva og stóla uppá sítt egna lið, so fer alt hitt nokk koma.”

### Vit skulu klára Kyndil

At enda siga tær báðar, at vegurin til ovara bólk í endaspælinum er at vinna móti Kyndli. “Ja, vit vilja heilt klárt enda í ovara bólki í endaspælinum. Tað er sera týdningarmikið hjá okkara ungu leikarum. Um hetta skal lata seg gera, so mugu vit vinna á okkara størstu kappingarneytum, og her er talan kanska serliga um Kyndil, men eisini Søljuna.”

Tað er greitt, at tey á Strondum vita, hvat tey vilja. Nú verður spennandi at síggja, um ungu leikararnir fara at vera klárir í ár. Eitt er tó sikkurt. Hetta er eitt lið í framgongd, og vit fara heilt sikkurt at síggja nógv til fleiri av hesum leikarum í framtíðini.

